# Gerðabók hjá Vestmanna Bygdarráð
# Bygdarráðsfundur tann 28. august 2024, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Røgvi, Laila Haldansen, Anja Haldansen, Ingi Olsen og Elsi Christiansen
**Skrivari:** Rúna Ingunardóttir

Vísandi til grein 18, stk. 2, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri hava Pauli T. Petersen, Sára Jógvansdóttir og Eyðun Hansen, boðað frá, at teimum bórust frá at møta á fundinum. Tiltaksliminir John Zachariassen og Elsi Christiansen fingu fundarboð og játtaðu at møta.

John Zachariassen møtti ikki á fundinum.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 300**
Forprosjektering av Vestmanna Skúla
8220002-1-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 3. juli 2024 mál um Vestmanna Skúla.

EYA arkitektar mæla til at arbeiða við forprosjektering í 2024. Henda fasa er tann næsta eftir skipanaruppskotið, sum varð samtykt í 2023.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til at játta kr. 1,5 mió kr. við eini eykajáttan.

Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt eykajáttanina við 1. viðgerð á fundi tann 4. juli 2024.

**Viðv. 300**
Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttanina við 2. viðgerð.

**Mál 301**
Leigugjøld fyri Ítrottarhøllina og hølir í Vestmanna skúla
J.nr.: 8216002-4-2024

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 21. august 2024 mál um leigugjøld fyri Ítrottarhøllina og hølir í Vestmanna skúla.

Vestmanna Bygdarráð samtykti tann 10. mars 1994 leigugjøld fyri leigu av ítrottarhøllini og hølum í Vestmanna skúla.

Fíggjarnevndin mælir til at leigugjøldini verða dagførd við hesum broytingum.

| **Hølið** | **Tíma** | **Pláss** | **Brúdleyp, føðingardag o.t.** |
|---|---|---|---|
| | | | |
| Ítrottarhøllin | 400kr | 400 | 10.000 kr. við atgongd til borð og stólar |
| Fimleikarhøll | 250kr | | 1.000 kr. uttan atgongd til borð og stólar |
| Aulan | 200kr | 100 | 2.000 kr. við atgongd til borð og stólar |
| Miðhøll | 200kr | 50-60 | 1.800 kr. við atgongd til borð og stólar |
| Ìtróttarhøll | | 800 | 15.000 kr. til dans |
| Svimjihilurin | 150 kr | 20 | 800 kr. fyri dagin |
| Húsavørar | 900 kr | | Fyri at seta borð og stólar upp. |
| Borð | | | 30 kr. stk. |
| Stólar | | | 15 kr. stk. |
| Kaffimaskinan | | | Skal latast VÍF |

**Viðv. 301**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt

Varð viðgjørt fyri **afturlatnum hurðum**

**Mál 302**
Ársins herðaklapp 2024
J.nr.: 6002-1-2024

Bókin lisin.

Fundurin lokin kl 19:15

Sign.:

Bjørg á Rógvi Laila Haldansen Anja Haldansen

Ingi Olsen Elsi Christiansen